FØÐINGAR

14. mars fingu Gisleyg Holm og Henrik Merkelsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

14. mars fingu Mirjam Jacobsen og Jan í Nesinum, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4630 gr.

14. mars fingu Anni Højgaard, Saltangará og Jan M. Lauritsen, Skipanes, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

15. mars fingu Óluva Zachariasen og Bjarni Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3200 gr.

15. mars fingu Tanja Schilder og Fróði L. Ejdesgaard, Oyndarfjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4100 gr.

15. mars fingu Molly Jacobsen, Skopun og Magni Johannessen, Toftir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4150 gr.

16. mars fingu Jórun Tórshamar og Robin Clementsen, Danmark, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 3010 gr.

19. mars fingu Eydna Mikkelsen og Peter Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2900 gr.

19. mars fingu Bettina Bruun og Jan Müller, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4000 gr.

19. mars fingu Rebekka Vestergaard og Rúni Póulsen, Selatrað, eina dóttur. Hon var 53 cm. long ov vigaði 3550 gr.

20. mars fingu Kristina Højgaard og Aleksandar Volfart, Rituvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

ANDLÁT

12. mars
Esra Olsen, ættaður úr Søldarfirði, búsitandi í Norra, 80 ár.

15. mars
Johan Syderbø, Klaksvík, 87 ár.

18. mars
Arni Nolsøe, føddur á Tvøroyri, búsitandi í Havn, 73 ár.
Steingrím Mørk, Sandvík, 75 ár.

19. mars
Jens Dimon, Porkeri, 64 ár.
Sámal Heldarskarð, Klaksvík, 92 ár.

20. mars
Jógvan Joensen, bóndi í Fuglafirði, 46 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 23. mars: Magnus á Stongum, tlf. 423006
Sunnudagin 24. mars: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Føstugudstænastur Pálmasunnudag
Vesturkirkjan: kl. 11, konfirmatión, Heri Joensen
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Hósvík: kl. 11, konfirmatión, Emil Olsen
Hvannasund: kl. 12, konfirmatión, Elsa Funding
Miðvágur: kl. 12, altarg., David Johannesen
Leiti: kl. 12,
Hov: kl. 16, Marianne Telling
Vestmanna: kl. 11, konfirmatión I. P. Dam
Kvívík: kl. 12, M. Bæk, kl. 17, Kjartan Mørkøre
Christianskirkjan: kl. 11, konfirmatión, Hans Eiler Hammer
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10,
Árnafjørður: kl. 12, altarg.
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
Tvøroyri: kl. 11, konfirmatión, Jónsvein Bech
Havnar kirkja: kl. 11, konfirmatión, Sonja Klein
Kaldbak: kl. 12, Bjarni Bæk
Skálavík: kl. 11, konfirmatión, Jákup R. Hansen
Leirvík: kl. 11, konfirmatión, Uni Næs
Gøta: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Skála: kl. 11, konfirmatión, Jógvan Friðriksson

Í Christianskirkjuni gongur talvan fyri Guds orðs boðan.

Í Vestmanna, Kollafjarðar og Hósvíkar kirkjumv erður farið ikirkju kl. 11, vegna broytta kirkjutíð.

Katólska kirkjan
Skírhósdag kl. 17 Messa, kl. 19-24 Tilbiðjan í Kerit.
Langafriggjadag kl. 11 Krossvegur, kl. 15 Pínslusøga Harrans. *1)*
Páskaaftan kl. 22 Páskavøka
Páskadag kl. 11 Hámessa, eingin sunnudagsskúli.
2. Páskadag kl. 11 Messa.
1) Talvan gongur til frama fyri Heilaga Landið

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti har majorarnir Kari og Alv Tollisen úr Noreg tala. Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing) Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 »Samkoman syngur páskasálmar«. Páskatekstir verða lisnir frá Jesus ríðir inn í Jerusalem til uppreisnina.

Rhema á Hálsi
Mánakvøldið og týskvøldið kl. 20.30 Bønartímin.
Mikukvøldið kl. 20 Samkomufundur.
Friggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids (barnaklubbur).
Sunnudagin einki møti vegna møti í Klaksvík. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti, kl. 21 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kristian Joensen, Gulak Hansen syngur.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti. Kl. 20 venur Manskórið.

Meinigheitin í Hoyvík á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, ongin sunnudagsskúli og møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Páskastevnan verður í Høllini á Nabb við Gordon Hickson úr Onglandi og Ole Henry Halleråker úr Norra.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Alex O'Campo, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Símun Absalonsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13
Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Saron, Vestmanna
Leygardagin kl. 15 til 17.15 Bibílseminar. Evni: Andi, sál og likam við Dánial á D. Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Húsmøti hjá Olevinu og Petur.
Tlf. andaktin 424 741.

Keldan, Skálafirði
Einki Vón fyri framman friggjakvøldið.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Jónfinn Sveinsson.
Sunnudagin kl. 17 møti við Jan Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Thabor, Fuglafjørður
Ungdómsmøti leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti.
Páskastevnan í Thabor byrjar 28. mars og endar 1. apríl.

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við breyðbróting. Øll eru vælkomin.

Gøta
Ungdómsmøti verður í Kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Hans Kristian Johannesen og ung úr Leirvík luttaka.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10 Bøn, kl. 19 Alpha-skeið, kl. 20.30 Opið hús. Luttøka úr Rhema.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, luttøka úr Rhema.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli og einki møti vegna konfirmatión.
Týskvøldið kl. 20 Bibliutími.

Aglow, Sandoy
Møti verður í Sólarris í Húsavík leygardagin kl. 20 við vitjan úr Havn. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Café One Way, Tvøroyri
Friggjakvøldið og leygarkvøldið letur Cafein upp kl. 21. Skopuningar luttaka.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jacob Poulsen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í Fjallbrúður, Elisabeth og Sámal Jákup Joensen tala. Sangvenjing eftir møti.

Páskamøtini í »Framtíðini« byrja mikukvøldið kl. 19. Majorarnir Kari og Alv Tollisen og luttakarar úr Havn tala, vitna og syngja. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Ongin sunnudagsskúli sunnudagin. Kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Porkeri
Hans Arni Jensen talar á møtinum sunnudagin kl. 18.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya,
Bryggjubakki 10,
100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Felagið Tórshavn
Sunnudagin 24. mars vitja vit í Tórshavnar Golfklubba í Hoyvíkshaganum og sleppa at royna okkum. Spáka gjøgnum nýggjar býlingar/sniðgøtur oman til Havnar. Byrjað verður við Norðurlandahúsið kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði. Tilmelding.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Sælir eru teir, sum ikki sóu, og trúðu tó!
Jóhs. 20,29

Hesi orðini sigur hin upprisni Jesus við hin ivandi Tummas. Sanniliga er Jesus upprisin. Hetta sigur trúgvin. Og trúgv okkara er sannford um, at Jesus Guds sonur livir og doyr ikki meir. Hóast vit og skil ikki vil skilja hetta, so fáa vit ikki ytri prógv uppá henda sannleika. Vit og skil gerast ikki nøgd; men trúgvin er nøgd við sannleikan í boðskapinum.

Hvat byggir uppreisnartrúgvin á? Jú, hon byggir á ta tómu grøvina og á opinberingarnar fyri lærusveinumum. Hetta eru tekin um, at Jesus er upprisin. Men meir enn tekin er hetta ikki. Tá vit í kirkjuni hoyra henda boðskapin, so kunna vit, sum kristin, ikki annað, enn siga ja til henda boðskap. Sanniliga er hann upprisin. Og tað merkir, at eisini vit skulu rísa upp. Her er talan um eina likamliga uppreisn. Talan er um eitt dýrdarlíkam. Uppreisnin merkir, at Jeus hevur sigrað á deyðanum. Deyðin hevur bert eina avmarkaða tíð. Og vit skulu liva um ævir.

Hetta er páskaboðskapurin til okkum annars deyðiligu menniskju. Jesus sigraði á synd og deyða. Lívið sigraði og fer at sigra. Jesu sigur er okkara sigur í trúnni. Andin og orðið gevur okkum hetta. Hetta er gáva til okkara. Nú er ljós fyri framman. Og lívið er fyri framman. Deyðin er bert ein blundur, nakað fyribils. Hann er ikki ævigur. Páskaboðskapurin boðar okkum gleði. Eina gleði, sum kveikir vón og liv í hjarta okkara. Henda uppreisnargleði er eisini til tin. Jesus livir, og vit skulu liva!

Amen

David Johannesen

TILTØK

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 25. mars:
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir. Vit mála
kl. 14-18 Vit mála. Kortspæl, telving og onnur spøl
kl. 14-18 Tilmelding til døgurðan mikudag, tlf. 316491
Týsdagin 26. mars:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Óli Vang. **Øll eru hjartaliga vælkomin**
kl. 15 Urtagarðsrøkt, Michael Jacobæus
Mikudagin 27. mars:
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
Hósdagin 28. mars:
Skírhósdagur – stongt.
Fríggjadagin 29. mars:
Langifríggjadagur – stongt. Tilhaldið verður afturlatið til og við 1. apríl. Vit ynskja øllum einar gleðiligar páskir.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsarið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin: mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 – fyri børnum uttan ansing.

Føroya Heimavirksfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

BRÚDLEYP

Í dag, leygardagin kl. 16 giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík, Súsanna Hansen, Klaksvík og Jákup Petur M. Eliassen, Skála. Veitslan verður fyri innbodnum á Skúlaheiminum kl. 19.00.

Leygardagin 30. mars giftast í Sundby kirke, Amager, Elin Ludvig, Tórshavn og Flemming Foget, Thisted. Brúdleypsadr.: Moldaugade 12, st.th. 2300 København S.

Leygardagin 13. apríl kl. 10.30 giftast í Sjóvar kirkju Bogi Kallsberg, Klaksvík og Meinhild Jacobsen, Kolbeinagjógv. Kl. 13 verður borðhald í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tit, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum verða biðin um at siga frá innan 1. apríl á tlf. 447801, 228227 ella 456040.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 16. apríl hava Súsanna og Hans Terji Hansen, Søldarfirði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 20. apríl kl. 19. Tey, ið vilja gleða parið, verða vinarliga biðin at ringa 441579 ella 253921 innan 8. apríl.

Týsdagin 23. apríl hava Mildrid og Sunnleif Leo, Leirvík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík 27. apríl kl. 18. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma eru vælkomin at ringja á tlf. 443203 áðrenn 20. apríl.

60 ÁR

Mikudagin 27. mars fyllur Henning Bøgesvang, prestur, 60 ár. Móttøka verður 27. mars kl. 14-18 í Donsku kirkjuni, Torild Wulffsgatan 8, S-413 19 Gøteborg, Svoriki. Telefon 0046 31822309. Fax 0046 31828615.

Rokskapurin 2001

Rakstrarurslit

DKK 1.000	2001	2000
Rentuinntokur o.a.	383.252	361.308
Rentuútreiðslur o.a.	122.736	106.703
Rentuinntokur netto	260.516	254.605
Vinningur av partabrevum	207	194
Kostnaðar- og proviziónsinntokur	14.446	12.827
Útreiðslur til kostnað og proviziónir	233	163
Rentu- og kostnaðarinntokur netto	274.936	267.463
Virðisjavnan av virðisbrevum og gjaldoyra	18.782	-5.946
Aðrar vanligar inntokur	7.827	14.520
Úrslit av figgjarpostum	301.545	276.037
Útreiðslur til starvsfólk og umsiting	115.411	112.657
Av- og niðurskrivingar av virðisbrevum og ítøkilegum ognum	3.664	3.509
Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto)	-25.254	-170.924
Úrslit av kapitalláhugamálum	1.944	-2.989
Úrslit av vanligum rekstri undan skatti	209.668	327.807
Skattur	41.638	104.540
Ársúrslit	168.030	223.267
Býti av rekstrarúrslit:		
Ársúrslit	168.030	223.267
Flutt frá undanfarnum árum	1.225.868	1.126.401
Tokar	1.393.898	1.349.669
Nýtt til vinningsbýti	75.000	125.000
Javnan av grunni til nettouppskriving til innara virði	178	-1.199
Framflutt úrslit	1.318.720	1.225.868
Tilsamans	1.393.898	1.349.669

Fíggjarstøða 31. desember

DKK 1.000	2001	2000
Ogn		
Kassapeningur og ogn uttan uppsogn í tjóðbankum	244.143	32.496
Ogn hjá kredittstovnum o.a.	146.481	26.753
Útlán	3.361.496	3.163.674
Lánsbrev o.a	1.580.250	1.382.606
Partabrev o. a.	2.629	5.605
Kapitalpartar í leyslnýttum fyritokum	4.340	3.430
Kapitalpartar í tilnýttum fyritokum	111.357	110.323
Ótokilegar ognir	0	332
Ítokilegar ognir	53.694	49.332
Egnir kapitalpartar	0	0
Aðrar ognir	83.141	138.826
Tíðaravmarkingar	4.524	4.383
Ognir tilsamans	5.592.054	4.917.762
Skuld		
Skuld til kredittstovnar og tjóðbankar	112.068	124.691
Innlán	3.941.220	3.266.080
Onnur skuld	114.683	195.274
Tíðaravmarkingar	10	100
Ávsetingar til skyldur	5.175	5.750
Egnpeningur		
Partapeningur	100.000	100.000
Grunnar	178	0
Flutt frá undanfarnum árum	1.225.868	1.060.620
Flutt frá ársúrsliti	92.852	165.248
Eginpeningur tilsamans	1.418.898	1.325.868
Skuld tilsamans	5.592.054	4.917.762
Tal sum ikki eru tikin við í javnan		
Ábyrgdir o.a.	278.171	139.870
Aðrar skyldur	40.429	61.118
Tilsamans	318.600	200.988

Vinningsbýtið fyri 2001, 75%, verður útgoldið tann 2. apríl 2002

FØROYA BANKI